# Bråvalla og listin

Bråvalla er sta›ur í Svøríki, har søguligur bardagi var millum sviar og danir. Rætt sum í Mannafellsdali. Men stórsti partur av hesum bardaga man hava ver›a framdur í sagnum. Kn‡ttar at Bråvalla slættanum í Ostergötland. Í dag ver›ur hugtaki› ”bråvallaslag” brúkt um drápiligan bardaga og ógvusligt or›askifti. Sambært Nudansk Ordbog í hvussu er. Men júst hetta hugtak n‡tir ummælarin Flemming Andersen í Aktuelt, tá hann 9.november umrø›ur n‡ggju listabókina hjá Bár›i Jákupssyni ”Færøernes Billedkunst” sum danska heiti er. Og hann nevnir fleiri ”bråvallaslag” í føroyskari list. Flemming sigur seg kunna síggja ta› eljustrí›, sum er millum listafólk í Føroyum, endurspegla› í bókini hjá Bár›i. Havi spurt meg fyri hjá høvunda, útgevara og framstandandi listafólki, um tey hava varnast eljustrí›, ella ”bråvallaslag” í føroyska listaheiminum. Men nei, ta› vita tey einki um at siga. Tíansheldur fleiri. Kanska onkur lesari kann hjálpa.

# Christian Matras 100



100 ár

**Me›an farna vika stó› í Jørgin-Frantz'sa tekni, so fer komandi vikan at standa í tekni Kristian á Brekkumørks. Ta› er yrkjarin og granskarin Chr. Matras. Hundra› ára dagur hansara er hósdagin hin 7. desember. Ta› er í hesum sambandi, at He›in M. Klein settur lei›ari á Skúlabókagrunninum, her í bla›num huglei›ir um Chr. Matras.**

*Birgir Kruse*

Hósdagin og teir bá›ar fylgjandi dagarnar skipa Fró›skaparsetri›, Fró›skaparfelagi›, Landsbókasavni›, Rithøvundafelagi› og Nor›urlandahúsi› fyri ymsum tiltøkum, sum øll taka stø›i í lívi og verki Kristians.

”Hans minsta skaparverk er stórt” kallar Martin Næs sín fyrilestur hósmorgunin, har greitt ver›ur frá um t‡›ingarnar hjá skaldinum. Sí›ini fer Andrias Justesen stud. mag. av Vi›arei›i at rø›a um náttúruskaldskapin hjá Kristiani Matras. Heiti› er ”Heimurin í døggdropanum; ævinleikin í løtuni”. Framm móti middegi fer íslendski or›abókarithøvundin Gu›rún Kvaran at grei›a frá um søguna hjá or›abók Háskúlans í fortí›, nútí› og framtí›. Fyrilestrarnir ver›a á Føroyamálsdeildini á Fró›skaparsetrinum.

Um kvøldi› hendan hundra› ára fø›ingardag, ver›ur sømdargáva úr Grunni Kristians á Brekkumørk latin í Nor›urlandahúsinum. Fyrst hevur Malan Marnersdóttir rektari inngangsor› og sí›ani ver›ur gestafyrilestur vi› donsku Jonnu Louis Jensen professara. Tá er komi› á mál og sjálv handanin av ársins sømdargávu kann fara fram. Á hundra› ára degi Kristians, sum leggur navn til grunnin. Ta› ver›ur Jógvan í Lon Jacobsen sum handar gávuna.

Fríggjamorgunin ver›a tveir fyrilestrar á Føroyamálsdeildini á Fró›skaparsetrinum. Nor›ma›urin Trygve Skomedal fer at rø›a um føroyskt kvæ›amál og føroyska málsøgu. Skomedal er professari í Oslo. Seinna fyrilesturin henda fyrrapartin heldur Jóhan Hendrik Winther Poulsen professari. Yvirskriftin er ”Or›ama›urin Chr. Matras”. Um fyrilesturin sigur Jóhan Hendrik: ”Or›hagur var Chr. Matras fram um mangan. Kunnleika til føroyskan málarv og skaldsins hugflog hjálptu tí› pum málinum ”úr síni or›aleysu ney›”. Givin ver›a dømi um or›, i› hann hevur smí›a›, og sum nú liva á føroyinga tungu. Eisini ver›ur bori› vi› hann sum or›asavnara og or›abókahøvund.”

Eftir ein døgur›aste›g heldur sviin Bo Almqvist fyrilestur. Hann er professari í Dublin og evni hansara er ”Irland i ord och anda – Chr. Matras' iriska kontakter och forskning”. Í hesum forkunnuga fyrilestri ver›ur røtt um granskingina hjá Chr. Matras av gæliskum lánor›um í føroyskum og annars ta› mentanarsamskifti, sum hevur veri› millum Nor›anlond, Skotland og Írland.

Leygardagin hin 9. desember ver›ur fari› í Nor›urlandahúsi› at hei›ra› Chr. Matras á tri›a degi. Klokkan 16 fer forma›ur Rithøvundafelagsins Gunnar Hoydal at siga frá, me›an Jens Pauli Heinesen og Óli á Geilini fara at lesa upp. Árni Hansen spælir eitt brot úr Norsku Løvu hjá Williami Heinesen og Gur›un Gaard mag.art. fer sí›ani at halda fyrilestur um Chr. Matras undir heitinum ”Menniskja›, málvísindama›urin og skaldi›”. Eftir fyrilesturin syngur Tórshavnar Manskór undir lei›slu av Bjarna Restorff. Eins og kvøldi› fyri ver›ur enda› vi› felagssangi.

Í sambandi vi› hundra› ára haldi› ver›ur eisini frams‡ning av tilfari um og eftir Chr. Matras á Landsbókasavninum. Frams‡ningin letur upp á sjálvum hundra› ára degnum, hósdagin hin 7. desember. Henda sama dag kemur út bók ”Chr. Matras: Greinaval – frø›igreinir”.

# Geylan og skreljan

Fwd: Teldubrævi›
From: HE‹IN POULSEN
hp100@soton.ac.uk
To: post@sosialurin.fo

*He›in Poulsen úr Southampton*

Úrvali› av tí›indaflutningsveitarum er naka› væl størri í Bretlandi enn í Føroyum, og er ta› heldur ikki undarligt, tá ein sammetir støddina á londunum bá›um. Umframt tey mongu dagblø›ini, útvarpsrásirnar, sjónvarpsrásirnar og internetsí›urnar er ta› alsamt meira vanligt at fáa tí›indi fram á fartelefonini.

Tí›indi fara altí› at vera partur av gerandisdegnum hjá teimum flestu, og er ta› alt umrá›andi at tey eru uttanvelta›i og avspegla sannleikan, til tess at lesarin kann líta á tey sum sonn.

Ein gó›ur háttur at koma nærri at skilja stø›una hjá einum landi og fólkinum, er at fylgja vi› tí›indunum vi›víkjandi landinum. Vansin kann vera, at fjølmi›lar tí›um halda seg til ávísan leist hvussu landi skal umtalast og kann hetta skapa eina rangvenda mynd av landinum. Sum dømi kann nevnast, at hvørja fer› vit hoyra um Amsterdam, er ta› altí› vi›víkjandi tí sera liberala undirhaldspolitikkinum. Tí›indi frá londunum í Su›ur Ameriku eru sum oftast um rúsevni, har›skap og korruptar stjórnir. Sjálvandi h‡sa londini ikki einans teimum tí›indum, vit ver›a bor›reidd vi›. Bretland ver›ur eisini umbo›a selektivt, hvør hevur ikki hoyrt um BSE-sjúkuna, sum næstan hevur yvirhála› tey kongaligu, sum umbo› fyri landi.

Henda grein l‡sir nøkur fá evni, i› hava veri› uppi at venda í fjølmi›lunum og er hon einans ein dropi í havinum av tí dagliga tí›indaflutninginum.

Sum sagt hava BSE-sjúkan og Creutzfeldt-Jacob fylt stóran part av tí›indaflutninginum, bæ›i her í Bretlandi og a›rasta›ni. Komi er fram eftir drúgva kanning av Whitehall, at rá›harrar og fulltrúar ikki gjørdu sítt besta til tess at fyribyrgja, at neytaø›i gjørdist til fólkaø›i.

Mangur hevur funnist at teimum kanningum, i› hava veri› í Føroyum av okkara høgtstandandi fólki. Ta› er ov d‡rt, tekur ov langa tí› og frágrei›ingarnar áleggja ikki beinlei›is ábyrgd á tey ávísu fólkini.

Kanningin hjá bretum um BSE kosta›i skattaborgaranum GBP 27 milliónir, er í 16 bindum og telur 4.000 sí›ur av tøttum teksti. (Kanningin er at finna á internetinum á sí›u http:www.bseinquiry.gov.uk). Úrsliti› av kanningini er ikki, at ávísur persónur ver›ur gjørdur til hólk. Skriva stendur, at ta› eru "no villains" og "no scapegoats" at finna, tó ver›ur harliga funnist at tí tunga embætismannaveldinum sum heild, uttan at seta fingurin á húsakøstin.

Í Bretlandi, sum a›rasta›nis, ver›ur roynt at eggja kvinnum at luttaka í politikki. Eitt uppskot, i› hevur sæ› dagsins ljós, er at avtaka náttarsetur hjá Undirhúsinum. Fólkavalda tingi í Bretlandi, i› vanliga ver›ur kalla› Undirhúsi›, sendir ikki limirnar til hús, tá náttin legst yvir landi›, um vi›ger›in ikki er li›ug, men heldur á fram alla náttina, um ta› er ney›ugt. Á›urnevnda uppskot hevur fyri eyga at gera tingi› meiri familjuvinarligt og at betra um møguleikan hja mammum at vera mammur, samstundis sum tær kunnu tæna sum fólksins mammur. Ta› er eingin onnur enn Javnstø›unevndin, i› mælir til, at Undirhúsi› skal avtaka náttarseturnar og geva tinglimunum durafjór›ingin í seinasta lagi klokkan hálvgum ellivu, júst á sama hátt sum vertshúsini gera. Um ni›urstø›an í tilmælinum er sonn, kundi hugsast at Føroya Løgting átti at veri á tremur vi› kvinnum.

Sambært eini kanning, sum Imperial College í London hevur gjørt, hava granskarir tilluta teimum 65.000 fólkunum á Kanal oyggjunum, i› liggja í Ermasundi, tann ivasama hei›ur, at vera heimsmeistarir at n‡ta sterkan løg. Ta› vóru myndugleikarnir á Kanal oyggjunum, i› fingu kanningina í lag, eftir at teir varna›ust alt fleiri tilbur›ir, i› høvdu samband vi› rúsdrekka n‡tslu.

Kanningin vísir, at hvør oyggjabúgvi yvir 18 ár drekkur 12,9 litrar av reinum rúsdrekka árliga. Ta› er ta› sama sum 130 fløskur av víni til hvønn einstakling, tríggjar øl um dagin ella 30 litrar av vodka um ári›. Hædd er tikin fyri tí gott eini millión fer›afólkum og árstí›ararbei›smegi, i› oyggjin breggjar sær av at vera vertir fyri árliga.

Portugal liggur sum nummar tvey og Frakland sum nummar tr‡ í rúsdrekka n‡tslu. Bretland liggur naka› aftanfyri, har hvør íbúgvi "einans" drekkur 7,3 litrar av reinum rúsdrekka árliga.

Frágrei›ingin er gjørd undir lei›slu av Prof. Gerry Stimson's, i› hevur n‡tt tøl frá tollmyndugleikunum og eftir teimum vanligu frymlinum. Vi›merkt ver›ur í frágrei›ingini at eingi tøl eru atkomilig frá Russlandi ella Íslandi, man hann hava sæ› tølini frá Føroyum?

Lord Irvine of Lairg, ver›ur í hesum døgum ákærdur fyri brot á mannarættindasáttmálan, i› n‡liga fekk fult gildi í Bretlandi. Hægsti løgfrø›ingurin í embætismannaveldinum í Bretlandi gongur undir heitinum Lord Chancellor, og er ta› Lord Irvine of Lairg. Hann var valdur naka› eftir fólkatingsvali í 1997 av forsætisrá›harranum Tony Blair. Tá tann ungi n‡klakti løgfrø›ingurin Tony á fyrsta sinni skuldi royna sínar lógsnildir, var ta› undir arbei›sgevaranum Lord Chancellor Lord Irvine of Lairg, hetta var tó ikki hansara heiti tá.

Nú hevur ein kvinna, Jane Coker, lagt sak móti Irvine, tí sambært henni hevur hann broti› mannarættarsáttmálan, vi›víkjandi javnbjó›is arbei›smøguleikum millum menn og kvinnur. Jane, i› sjálv er sakførari, førir fram, at arbei›i› sum serfrø›isrá›gevi hjá Irvine var ikki l‡st leyst, og um ta› hev›i veri›, hev›i hon søkt ta›, i› er lønt slaka millión danskar krónir um ári›. Hansara grundgeving fyri ikki at l‡sa starvi leyst er, at einans fólk i› kenna hann væl, vóru egna›i til starvi. Funnist ver›ur mangan at frændaveldi, Lord Chancellor Lord Irvine of Lairg hevur ikki einans n‡tt frændaveldi sum verju, men sum grundgeving.

Hví hava fólk eina tráan eftir tí›indum, tí›indir um vanlukkur, um regnney› hjá fremmandum fólkum og um óstbeinbrot hjá eini eldri damu úr einum fjarskotnum landi? Er ta› tí vit vilja hjálpa, hava samhuga›, eru áhuga›i, taka lut í? Ella er ta› tí vit hava tørv fyri undirhaldi, og er naka› betri undirhald enn óskepnan hjá ø›rum?




Postverk Føroya

**Jólapostur 2000**

**Jólapostur til grannalondini eigur at vera á posthúsinum í Tórshavn ikki seinni enn:**

| | Flogpostur brøv | Flogpostur pakkar | Skipspostur brøv | Skipspostur pakkar |
|---|---|---|---|---|
| Danmark | 19.12. | 18.12. | 14.12. | 14.12. |
| Finnland | 11.12. | 11.12. | 7.12. | 7.12. |
| Grønland * | 15.12. | 8.12. | | |
| Ísland | 15.12. | 14.12. | | |
| Noreg | 11.12. | 11.12. | 7.12. | 7.12. |
| Svøríki | 15.12. | 14.12. | 14.12. | 14.12. |
| St. Bretland | 15.12. | 8.12. | 7.12. | 23.11. |

* ikki galdandi fyri Thule og Eysturgrønland.
**Uppl‡singar** um seinastu freistir til útheimin eru at fáa á posthúsinum, tlf. 311007 og www.post.fo.
Ta› er umrá›andi fyri skjóta tollavgrei›slu í móttakaralondunum, at tollsøgnin er t‡›ilig og fullfíggja›.

Ve›urlíkindi kunnu gera, at postur ver›ur seinka›ur – tí ver›ur rátt til at senda hann í gó›ari tí›.

**Innanlands**
Jólapostur til móttakarar í Føroyum eigur at vera latin inn í seinasta lagi **t‡sdagin 19. desember.**

**Tilskriftaleysar sendingar til útberingar fyri jól**
14.–15. desember ver›a tilskriftaleysar sendingar bert bornar út, um hægri postgjald ver›ur goldi›.

Frá og vi› 14. desember fram til jóla ver›ur ikki tiki› ímóti tilskriftaleysum sendingum.

Seinasta freist fyri innlating:
Til útberingar fyri vanligt postgjald: mánadagin 11. desember kl. 12.00.
Til útberingar fyri hægri postgjald: mikudagin 13. desember kl. 12.00.

Hækka›a postgjaldi› fyri sendingar til útberingar 14.–15. desmber:
Fyri sendingar upp í 100 g: 40 oyru eyka fyri hvørja.
Fyri sendingar yvir 100 g: 60 oyru eyka fyri hvørja.

Postverk Føroya ynskir øllum vi›skiftafólkum eini gle›ilig jól og eitt gott n‡ggjár!



**KVØLDSKRÁ Á HANDILSSKÚLANUM**

**INNSKRIVINGARSEÐIL, várhálvan 2001**

| | |
|---|---|
| Ættarnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Tel heima: |
| Gøta: | |
| Postnr./bygd býur: | Teldupost adr.: |
| Starv/arbeiðspláss: | Tel arbeiðspláss: |

**Merkonom, Havn** (setið kross)

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leiðsla og samstarv | mikud. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Virkisfyriskipan | mánad. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Virkisbúskapur | týsd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Arbeiðsrættur | mánad. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Greining og fígging | týsd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Millumlanda vinnul.rættur | mikud. | 18.00-20.30 | ☐ |
| KT í fyrisitingini | hósd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Kreativar loysnir | týsd. | 18.00-20.30 | ☐ |

**Merkonom, Klaksvík**
Virkisbúskapur ☐
Um tú longu hevur teknað teg til í summar, er ikki neyðugt við tilmelding nú.

**Merkonom, Vágar**
Virkisbúskapur ☐
Um tú longu hevur teknað teg til í summar, er ikki neyðugt við tilmelding nú.

**Merkonom, Suðuroy**
Virkisbúskapur ☐
Um tú longu hevur teknað teg til í summar, er ikki neyðugt við tilmelding nú.

**Kostnaður:**
Merkonom, luttøkugjald: kr. 400,00 fyri hvørja lærugrein
Depositum: kr. 250,00 fyri hvønn persón.

**Ivast tú, ring og spyr eftir vegleiðara**

**Freistin at tekna seg til kvøldskúlan er 11. desember 2000. Skúlagongdin byrjar mánadagin 8. januar 2001. Øll undirvísing er reytað av nóg stórari undirtøku. Skúlin er stongdur frá 22. desember 2000 til 2. januar 2001.**

**undirskrift/dagur**

FØROYA HANDILSSKÚLI
Postrúm 177 - 110 Tórshavn - Tel 317177 - Fax 313374
www.hsh.fo



**Kunnger›**

**frá útskiftingarnevndini fyri Kunoyar bygd**

Útskiftingarfundur ver›ur hósdagin 14. desember kl. 11.00 í bygdarhúsinum í Kunoy.

Til vi›ger›ar ver›ur uttangar›sútskiftingin.

**Matrikulstovan**
*tann 28. nov. 2000*
N.v.
Øssur Á. Midjord
útsk. form.



**DANNY TRANSPORT**
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**



VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820